STARVSLÝSING

# Fá ávirkan á landsins byggilist [endurlýsing]

Hevur tú dirvi til at standa á odda fyri eini deild í stórari menning, og hevur tú áhuga fyri landsins byggilist, so kunnu vit bjóða tær øðrvísi royndir í einum spennandi og avbjóðandi starvi sum deildarleiðari á bygningadeildini hjá Landsverki.

### Arbeiðsøkið

Sum deildarleiðari á bygningadeildini fært tú ábyrgdina av at:

- taka byggilistaligar avgerðir – eisini um funktionalitet og góðsku
- menna máls- og arbeiðsøkini hjá deildini
- arbeiða og uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist
- stuðla og menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar

Tú fer at luttaka í tvørfakligum verkætlanum og arbeiða við fólki, sum hava ymiskar fakligar útbúgvingar og royndir. Á deildini starvast umframt deildarleiðaran 3 arkitektar, 1 byggifrøðingur og 1 tekniskur assistentur. Tú vísir beinleiðis til stjóran og verður partur av leiðslubólkinum hjá stovninum.

### Førleikakrøv

Vit leita eftir einum arkitekti. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum innan byggivinnuna er ein fyrimunur.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og leggja tí stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, hevur góð samstarvsevnir, dugir at skipa arbeiði á deildini og í tvørfakligum verkætlanum.

Vit vænta, at tú eggjar, gongur undan og gevur títt íkast til menning av deildini og arbeiðsplássinum sum heild. Tú dugir somuleiðis at síggja møguleikan í at menna og broyta títt starv.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postboks 78,
FO 110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2007. Merkið umsóknina „Umsókn – Deildarleiðari“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella teldupost ob@lv.fo

Eisini er møguligt at kunna seg um málsøkið „byggi- og bygningaumsiting“ og bygningadeildina á www.landsverk.fo.

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK byggir land

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

